# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kommunurnar

Tað var tann tíð, tá kommunumørkini, við nøkrum undantøkum, fylgdu sýslumørkunum. Um hetta mundið var undirstøðukervið í Føroyum ikki útbygt, og tí var trupult hjá hesum gomlu stórkommununum at virka. Hetta mundi vera ein orsøkin til, at kommunurnar seinni fóru sundur í einar hálvthundrað eindir. Hetta var ivaleyst bæði hent og skilagott til ta samfelagstøðu, ið tá var galdandi. Seinanastu hálvt hundrað árini er samfelagið nógv broytt, og undirstøðukervið hevur verið fyri kollvelting. Men hóast breið semja hevur verið um at fremja hesa stóru menning innan alt, sum eitur undirstøðukervi, so hevur lítil hugur verið at broytt kommunubygnaðin samsvarandi. Hetta er ikki so løgið, tí við teimum mongu kommunalu eindunum hava borgararnir havt eitt nærdemokrati, ið hevur nógvar fyrimunir.

Men seinnu árini er tað vorðið alt greiðari fyri fjøld av borgarum eins væl og fyri landsmyndugleikum, at gamli kommunubygnaðurin má broytast. Hetta broytta tilvit kemur ikki bert av nógv útbygda undirstøðukervinum, men kemur hetta heldur av nýggjum politiskum rákum í Norðurlondum: almennar tænastur eiga at verða fluttar nærri borgara og brúkara. Talan er ikki bert um barnaansing, eldrarøkt og fólkaskúla, men landspolitikkarar eru eisini farnir at umhugsa aðrar almennar tænastur, ið higartil hava verið mettar sum landsuppgávur burturav. Her er við øðrum orðum talan um at flyta øki frá miðfyrisiting til lokalfyrisiting. Tilgongdin er byrjað, og hon kann ikki verða steðgað.

Men hendan tilgongd krevur rættiliga stórur og djúptøknar broytingar í kommunala bygnaðinum – tilgongdin krevur nógv størri kommunalar eindir. Landspolitikkarar og serfrøðingar hava leingi talað um í minsta lagi sjey og í mesta lagi níggju kommunur. Her er talan um eina kollvelting av kommunalu stýrisskipanini og tí er tað væl skiljandi, at nakrar ávísar kommunur eru ivandi, meðan aðrar taka undir við bygnaðarbroytingumum. Hesar seinnu hava skilt, at tað ræður um at verða framman fyri eina tilgongd, ið kemur uttan mun til, hvørja støðu kommunur og teirra borgarar hava til tær ætlanir, ið skiftandi landsstýri hava havt um bygnaðarbroytingar.

Nýggja landsstýrið hevur greitt signalerað, at tolið nú er um at vera uppi, og landsstýrið hevur latið almenningin skilja, at áðrenn hetta valskeiðið er runnið, skulu bert sjey kommunur vera í Føroyum. Í hesari støðu hava ávísar kommunur heilt broytt hugburð til samanleggingar, meðan aðrar standa í móti. Hesar síðstu halda framvegis ikki, at fortreytirnar eru nóg væl lýstar av landsmyndugleikunum. Nakað er um hetta. Hinvegin skulu hesar ivandi kommunur neyvan vænta sær greiðari útmeldingar frá landsmyndugleikunum enn hana, sum nýggir ráðharrin kom við í SVF í vikuni. Tað er skeivt at fremja samanlegging við makt. Latið so heldur tann konstruktiva dialogin ruddað slóð fyri tí bestu loysnini fyri allar partar.

**Sosialurin**

## Øll eru líka, men Tjóveldi er meira líka enn onnur?

**JENIS AV RANA**

formaður Miðfloksins



Bókin Animal Farm hjá Georg Orwell, haðani lætt umskrivaða yvirskriftin er lænt, man vera flestu føringum kunnug. Bókin, høvundin og citatið runnu mær í hug, sum eg í vikuni møtti øði tjóveldisins í sambandi við, at Miðflokkinum ognaðist annað umboð Føroya í Noðurlandaráðnum.

At flokkar fara í valbólkar til skipan av politiska arbeiðinum, herundir skipan av landsstýri og nevndum, er grundlegjandi og einki nýtt. At flokkar, ið ikki eru við í landstýrissamgongu eru í valbólki við samgonguna til val av nevndum, er heldur ikki ókent. Og at smærru flokkanir telva seg fram til størri ávirkan enn beinleiðis atkvøðutalið gevur teimum, er meira enn so hent áður. Hetta seinasta sóðu vit m.a. í 1998, tá Tjóveldi og Fólkaflokkurin í skipanini av sokallaðu fullveldissamgonguni keyptu ein flokk, ið hevði tvey løgtingsfólk, við tveimum landsstýrisfólkum.

Í Miðflokinum eru vit als ikki samd um, at fólkaræðið setur Tjóveldi í serstøðu millum flokkar! Vit vita einki um, at okkum øðrum áliggur skylda fyrst og fremst at hugsa um flokkin Tjóveldi, og at hesin hevur rætt fram um aðrar til ávísar sessir. Annars undrar tað okkum almikið, at flokkurin ikki hevur funnið útav, at arbeiðið fyri fullveldið, sum jú er einasta veruliga hugsón hesin flokkurin tykist hava, má førast her á landi, um nøkur vón skal vera fyri at røkka tí. At senda flokkin, hvørs stevna annars í løtuni tykist vera at lefra fyri tí fremmada og helst liggja skerfløt í ærufrykt fyri øllum, ið útlendskt er, út í heim at umboða okkum, má vera ein farin tíð!

Miðflokkurin fer út í heim at umboða einar Føroyar, ið vit eru takksamir fyri at vera partur av. Vit fara at kunna onnur um tær dygdir, ið eyðkenna føðilandið, samstundis sum vit her heima fara at virka fyri einum betri og tryggari samfelagi fyri øll at búleikast í.

Millum uppgávurnar her heima er at meta um tey árin, ið koma á okkum uttanífrá. Sjálvandi skulu vit taka ímóti, læra av og taka til okkum tað góða, men eins umráðandi er at finna og steðga tí, ið ikki er av tí góða. At júst hendan uppgávan er størri enn flestu gruna, fæst varhugi av í tí viðmerking, ið Dimma mikukvøldið ber víðari frá løgtingsformanninum. Har ger hesin annars skilagóði hampamaðurin seg til talsmann fyri einum kvinnukúgandi mentunnarpolitikki, sum Miðflokkurin í hvussu so er altíð fer at stríðast ímóti.

## Kaj Leo bindur um heilan fingur

**TÓRBJØRN JACOBSEN**



Klossuta royndin hjá Javnaðarflokkinum og Jóannesi Eidesgaard at sleppa sær burturúr annars hálovaða samstarvinum við Tjóðveldi, hevur nú fingið avleiðingar í málsøkjabýtinum millum ráðini í BAC-samgonguni. Táið fyrrverandi løgmaður og núverandi fíggjarmálaráðharri ikki átti dirvið at siga fólki frá politisku og veruligu orsøkini til slitið, tá íspann hann saman við fylgisneytum søguna um hurðina og lásið. Ein føroyskur Alfred Hitchcock var føddur. Jarnbrotið skuldi eitast at vera, at hann hevði ræðisrættin á ognunum í Tinganesi. Allir serfrøðingar, húsjuristurin hjá løgmanni og løgmansstjóranum undantikin, meintu, at als ongi prógv funnust fyri hesi sniðfundigu og søktu greiningini av málsøkjabýtinum undir CHE-samgonguni.

Prógvið um, at Løgmansskrivstovan hevur tikið í egnan barm og ásannað, at táverandi løgmaður leyp framav, táið hann “fysiskt” gjørdi seg inn á Uttanríkisráðið, fyri at finna eina ússaliga lopfjøl burturúr eini samgongu, sum Javnaðarflokkurin ikki hevði tæri, dirvi tíansheldur rygg til at samstarva í, er nýggja ásetingin um málsøkjabýtið, sum er lagt fram fyri almenningin á heimasíðu Løgmansskrivstovunnar ídag.

Meðan bíðað verður eftir kanningarstjóranum, hvørs setan bæði Kaj Leo og Jóannes siga seg at stuðla, hevur okkara nýggi løgmaður verið somikið skilagóður, at hann hevur bundið um heilan fingur við hesi orðingini:

**§ 3. Umsitingarøkið**

Løgmaður er ovasta umboð Føroya, samskipar starv landsstýrismanna og hevur eftirlit við teimum. Eisini umsitir løgmaður yvirtøkumál og yvirskipaðu viður-skifti Føroya mótvegis Danmark.

Stk. 2. Løgmaður varðar av ognunum í Tinganesi og ger av, hvør ið húsast skal í einstøku ognunum á matr. nr. 1, 2, 3, 7, 9, 10, 12a, 12c, 13, 36 og 149.

Stk. 3. Løgmaður hevur heimildir landsstýrisins mótvegis:

1) Norðuratlantsbryggju ni – vinnurekandi grunnur.

*Kelda: www.tinganes.fo*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.